Týskland skakað av gamlari skipsvanlukku

Ein bók, sum kendi týski rithøvundurin Günter Grass gav út fyrst í februar, hevur skakað Týskland. Í bókini "Im Krebsgang" viðger hann ta "gloymdu" skipavanlukkuna, tá russar søktu týska flóttafólkaskipið "Wilhelm Gustloff" 30. januar í 1945. Vanlukkan kostaði 9000 mannalív ella seks ferðir fleiri enn "Titanic"-vanlukkan

VANLUKKA
Árni Joensen

Longu sama dag sum bókin kom í bókahandlarnar, varð "Im Krebsgang" mest umrødda bókin í Týsklandi í ár. Ikki tí, týskarar hava øll árini vitað um tann syndarliga tilburðin í januar í 1945, men líka síðani heimsbardagan hava týskararnir bæði eystanfyri og vestanfyri roynt at gloymt ella dult ta syndarligu lagnuna hjá flóttafólkunum, sum royndu at flýggja úr Eysturproysen, men sum endaðu sínar dagar í einum sovjetskum torpedoálopi.

Tað er tí einki at siga til, at fyri mongum týskarum var tað sum at fáa eina spann av køldum vatni í høvdið, tá nýggja bókin kom út.

Týsku bløðini vóru eisini skjót at taka tann gloymda tilburðin upp. Stóra blaðið Der Spiegel lýsti vanlukkuna sum "tað týska Titanic" á sjálvari forsíðuni, og eitt annað av teimum stóru bløðunum, Süddeutscher Zeitung, samanbar vanlukkuna við tað, sum hendi í New York 11. september í fjør.

10.000 umborð

Av teimum eysturpoysarunum, sum fóru umborð á "Wilhelm Gustloff" í havnini í Gdynia í januar í 1945, vóru nógv tey flestu kvinnur, børn og ungdómar, sum royndu at koma sær undan sovjetska herinum, sum tók seg vestur frá Kønigsberg. Skipið, sum var bygt í 1937, varð upprunaliga ætlað at taka 1.400 fólk, og til heimsbardagin brast á, gjørdi skipið fleri ferðir við ferðafólki m. a. til Noregs. Navnið hevði skipið eftir ein embætismann í nazistaflokkinum. Hann hevði starvast í Sveits, men var deyður í 1936.

Í januar í 1945 flýddu fólk í túsundatali undan sovjetska herinum, og í Gdynia vóru fólk í túsundatali. Mong teirra vóru komin langvegis, summi til gongu og onnur í rossavognum, og støðugt máttu tey leita sær skjól undan teimum áhaldandi sovjetsku loftálopunum. Vit vita ikki við vissu, hvussu mong av hesum flóttafólkunum fóru umborð á "Wilhelm Gustloff". Alment varð sagt, at 6.600 fólk vóru umborð, men hildið verður, at tað rætta talið var oman fyri 10.000.

Men tey komu ikki langt. Longu fáar tímar eftir at skipið var farið frá bryggju tann 30. januar, varð tað álopið av sovjetska kavbátinum S-13, sum rakti tað við sínum torpedoum. Bara 1.200 av teimum, sum vóru við týska skipinum, vórðu bjargað. Fleiri túsund vóru innistongd niðri undir og fóru til botns við skipinum.

Góð ummæli

Í nýggju bókini vendir Günter Grass enn einaferð aftur til sínar barnadagar í Danzig, og fleiri av høvuðspersónunum í bókini eru gamlir kenningar frá øðrum av bókum hansara.

Flestu ummælini, sum "Im Krebsgang" hevur fingið í Týsklandi, hava verið góð. Blaðið Die Welt skrivaði í sínum ummæli, at nýggja skaldsøgan er tann besta hjá høvundinum seinastu nógvu árini.

Eitt eru allir ummælarnir á einum máli um, og tað er, at Günter Grass enn einaferð hevur skelkað - ikki bert sínar lesarar, men týska fólkið.

Málbitin

ársgamal
Tað er gott føroyskt mál at siga um ein,ið er eitt ár gamal, at hann er ársgamal. Tað er ikki føroyskt og málsliga av allari leið at siga "eitt ára gamal". "Smittan hevur gjørt seg inn á tann eitt ára gamla fiskin", var tað onkur,ið segði. Sigið heldur "…tann ársgamla fiskin".

einsporaður
Sagt var um ein skúla, at hann var "eittsporaður". Her skal ikki verða rætt um, hvat hetta merkir, men bert víst á, at orðið er skeivt myndað. Nú hevur tann, ið orðið gjørdi, helst hildið sum so: skúlin hevur bert eitt spor, spor er hvørkikynsorð, og tískil er hann "eittsporaður".

Tá ið orð verður soleiðis samansett, hevur fyrri liður stovnsnið sítt og verður ikki "bendur" eftir kyninum á seinna liði.

Maður, ið hevur eitt eyga, er ikki "eittoygdur", men einoygdur. Á sama hátt er skúli við einum spori ikki "eittsporaður", men einsporaður. Danska orðið er ensporet.

Kanska áttu vit at funnið annað orð?

hvítkál - ikki "hvíttkál"
Hetta orð sæst ofta skrivað "hvíttkál" á handilsskeltum og í blaðlýsingum. Her er tað sama at siga sum um lýsingarorðið einsporaður. Fyrri liður í samansettum orði sum hesum er ikki bendur, men varðveitir stovnin óbroyttan. Stovnurin er hvít-, og tískil er orðið rætt stavsett hvítkál. Á sama hátt: hvítvín, reyðkál (ikki "reyttkál", sum kanska eisini hevur verið at síggja). Eftir somu reglum eitur tað nýggjár (eldri nýár) og ikki "nýttár".

Úr Orðafari nr. 8., 1987

whazzzup!!!

Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

TELDUBRÆVIÐ

Frá: Turið Mørkøre, Noreg, turid.morkore@akvaforsk.nlh.no
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

Norðmenn vilja temja toskin

Í Noregi er áhugin fyri at ala tosk sera stórur, og somuleiðis eftirspurningurin eftir at fáa loyvi til at ala tosk. Enn er lítil vinningur í hesi vinni, men forsagnir vilja verða við, at tað bert er talan um stutta tíð, so vil lønsemi verða í at ala tosk.

Framleiðslan av aldum toski var 600 tons í 2001; helmingurin av nøgdini var frá fóðraðum smáfiski og helmingurin frá klaktum yngli. Forsøgnin sigur, at framleiðslan av toski verður 1.500 tons í ár, 3.000 tons næsta ár og 30.000 tons í 2010. Framleiðslan av yngli var eina knappa millión í fjør og hon verður væntandi 2 og 4 milliónir í 2002 og 2003. Lutvísa framleiðslan av klaktum toskayngli fer at verða støðugt vaksandi.

Sambært norsku fiskivinnustovuni eru í dag 192 loyvir at ala tosk, men ikki øll eru í brúk. Orsakað av, at framleiðslan av toskayngli er lág samanborið við eftirspurningin, er prísurin høgur. Yngulkostnaðurin er í dag umleið 40 prosent av samlaða framleiðslukostnaðinum, sum er 23-24 kr/kg av toski, aldur frá 20 g til 4.2 kg (framleiðslutíð uml. 16-18 mánaðir). Tað er givið, at yngulprísurin má lækka munandi, skal tað loysa seg at ala tosk. Í dag eru tað í stóran mun fyritøkur, sum hava ráð at koyra við halli eina tíð, ið ala tosk.

Fyri at fáa aliloyvi til tosk, má søkjarin kunna prógva, at hann/hon hevur 10.000 yngul at seta á sjógv.Tað ganga gitingar um, at rossahandil verður nýttur fyri at fáa hendur á yngli og harvið aliloyvi.

Yngulprísurin vil falla við vaksandi framleiðslu, men ilt er at siga nær yngultilboðið verður so stórt, at prísurin kemur á eitt haldbært støði. Tá øll tey nýggju yngulanleggini (20 anlegg) eru fult útbygd, hava tey orku til at framleiða 115-130 milliónir toskayngul, sum geva eina framleiðslu uppá meira enn 300.000 tons av aldum toski, men tá er skotbráið minst 12-15 ár. Hetta sambært Statens og nærings- og distriktsutviklingsfond, SND.

Aldur toskur er ikki heilt sum veiddur toskur. Tann størsti munurin er støddin á livrini, sum vanliga er tríggjar ferðir størri hjá aldum toski. Kókaður aldur toskur hevur vanliga hvítari og fastari kjøt, og hann missir meira vekt, tá hann verður kókaður. Tann aldi toskurin egnar seg ikki væl til at frysta, tí tá gerst hann so turrur í smakkinum og kjøtið verður ofta ov sokt. Eftirsum man roknar við, at tann aldi toskurin í stóran mun skal út á tann europeiska feskfiskamarknaðin, nýtist tað ikki at verða nakar trupulleiki, at hann ikki egnar seg at frysta. Aldur toskur hevur vanliga rundari kroppsform, og kann hetta verða ein fyrimunur um fiskurin skal skerast í kotilettir. Ein trupulleiki við toskaaling er, at fiskurin kann gerast tíðliga kynsbúgvin og ein kynsbúgvin fiskur hevur vánaligan vøkstur og vánaliga góðsku. Kokkar, sum hava roynt aldan tosk,siga, at hesin er avbera góður, og at teir onki hava ímóti at borðreiða við aldum toski til kræsnar gómar.

Miðvíst kynsbótararbeiði uppá tosk er byrjað í Noregi.

UTTAN ÚR HEIMI

Landið, sum ikki kann sleppa fortíðini

Laos er eitt av heimsins fátækastu londum, og landið hevur trupult við at fáa gongd á ta búskaparligu menningina. Myndugleikanir hava framt fleiri nýskipanir, men tað er trupult at sleppa tí gamla

BAKGRUND
Árni Joensen

Øll tey almennu hagtølini vísa, at tað gongur tann rætta vegin. Færri doyggja longu sum børn, nógv fleiri børn ganga í skúla, og tey gomlu liva eisini longur enn fyrr. Men kortini gongur tað ov seint.

Og tað sæst eisini aftur í yvirlitinum, sum ST á hvørjum ári ger um viðurskiftini í umleið 170 londum. Hetta yvirlit lýsir búskaparviðurskiftini í teimum einstøku londunum, heilsuviðurskiftini og skúlaviðurskiftini. Á tí seinasta yvirlitinum hjá ST er Laos í niðara endanum, og hóast fleiri lond og felagsskapir hava stuðlað menningini, er landið dottið tvey pláss longur niður í yvirlitinum, síðani tað varð kunngjørt seinast.

Tað er vert til bíta merki í, at hetta er hent, hóast landið sambært almennu hagtølunum hevur havt ein búskaparvøkstur millum fimm og sjey prosent um árið tey seinastu árini.

Gloymt

Tá Vietnam-kríggið herjaði í sekstiárunum og fyrst í sjeytiárunum, var Laos ofta havt á munni, men árini síðani hava bæði grannalondini og umheimurin gloymt landið, sum valla verður tikið upp á tunguna í altjóða fjølmiðlunum longur.

Verandi stýrið í Laos hevur sín uppruna í bardaganum ímóti gamla franska hjálandaveldinum, ein bardagi, sum endaði við, at kongaríkið Laos fekk sjálvstýri í 1953. Tann kommunistiska Pathet Lao-rørslan, sum seinni varð umskipað til ein kollveltingarligan politiskan flokk, helt á við bardaganum, og við stuðuli frá samsintum í grannalandinum Vietnam eydnaðist tað rørsluni at taka valdið í Laos í 1975.

Eftir hetta frætttist lítið og einki um ella úr Laos. Hernaðarliga hevði landið lítlan og ongan týdning, í búksparligum høpi var heldur eingin áhugi fyri landinum, og politiskt kundi landið eins væl ikki verið til.

Tað vóru tí eisini bara tey fægstu, sum varnaðust tað, tá Laos í 1986 fór in á eina nýggja búskaparliga kós. Malið var at seta tær marknaðarpolitisku skipanirnar í verk, og í 1991 varð felt inn í sjálva grundlógina, at Laos er eitt land við marknaðarbúskapi.

At marknaðarkreftirnar ikki hava fingið ta ætlaðu ávirkanina kemst av, at tann veruligi búskapurin framvegis er ógvuliga veikur, og at fólk framvegis liva sum í gomlum døgum. Sjálvt í høvuðsstaðnum Vientiane er vanligt, at fólk hava eitt ella tvey svín í garðinum aftan fyri húsini, og at tann elsti sonurin dyrkar so mikið av rísi, at tað kann nøkta tann dagliga tørvin hjá húskinum.

Stóran stuðul

Útlendskur stuðul er avgerandi fyri laotiska búskapin, og hildið verður, at næstan 80 prosent av teimum almennu íløgunum og 50 prosent av figgjarlógini sava frá útlendskum stuðuli. Hetta ger tað sera trupult hjá myndugleikunum at leggja nakrar veruligar búskaparpolitiskar ætlanir, tí tað eru alt ov mong, sum vilja hava ávirkan á, hvussu peningurin skal nýtast. Stjórnin hevur kortini boðað frá, at hon fyrireikar eina sera víðfevnda ætlan, sum verður liðug einaferð seinni í ár.

Tá talan er um náttúrurikidømi, hevur Laos nóg mikið av vatnorku og stórar skógir, og landið útflytir eisini væl av el-megi tl grannalandið Thailand, samstundis sum nógv timbur verður útflutt til fleiri lond. Men hetta eru ikki vinnugreinar, sum útvega nógv arbeiðspláss. Nakað av klædnaídnaði er, men kanningar hava víst, at virðisøkingin í hesari vinnuni er sera lítil.

Tey, sum javnan vitja Laos, siga, at nógv er hent í landinum og serliga høvuðsstaðnum Vientiane tey seinastu árini. Byggivirksemið hevur verið stórt, og útlendsk ferðafólk hava eisini fingið áhuga fyri landinum. Men alt verður stýrt av einum miðsavnaðum stýrislagi, og politiskt orðaskifti er at kalla eitt ókent fyribrigdi. Eingin lóglig politisk andstøða er í Laos, og tí er tað at kalla eingin, sum spyr, um politikkurin hjá myndugleikunum er tann rætti.

Ungdómsbumba

Politisku leiðararnir í Vientiane vilja fegnir seta meiri ferð á marknaðarbúskapin, men trupullikin er, at teir samstundis vilja varðveita eitt neyvt eftirlit við tí, sum hendir í samfelagnum. Og hesi bæði eru trupul at sameina.

Seinastu árini hevur Laos leitað sær samstarv við onnur lond. Í 1997 kom landið upp í felagsskapin hjá londunum í Landssynningsasia, ASEAN, og hesi fýra árini hevur laotiska stjórnin samstarvað við fleiri av hesum londunum, serliga á tí uttanríkispolitiska økinum.

Laotiska stjórnin tykist eisini hava skilt, at tað dugir ikki at byrgja seg inni og at halda upp á gamlar siðir. Gøtumyndin í Vientiane vísir eisini týðiliga, at fólk hava áhuga í tí, sum hendir aðrastaðni, tí parabolantennurnar eru rættiliga tættar í býnum. Men samstundis hava myndugleikarnir ásannað, at tættari samband við umheimin er ikki bara av tí góða. Í 1999 vórðu tólv ungfólk løgd inn á sjúkrahús við rúsevnistrupulleikum, og longu árið eftir fngu fleiri hundrað ungdómar somu viðgerð á sjúkrahúsunum

Útlendskir hjálparfelagsskapir, sum arbeiða í Laos, siga, at hetta er bara byrjanin til tað, sum kann gerast nógv verri. Felagsskapirnir vísa á, at tey flestu ungu eru arbeiðsleys, og at útbúgvingarmøguleikarnir eru ógvuliga avmarkaðir, og tí er tað kanska bara ein spurningur um tíð, til hendan ungdómsbumban brestur, gera myndugleikarnir ikki okkurt munagott fyri at forða tí.

Útlendsku felagsskapirnir eru á einum máli um, at skal Laos sleppa undan hesum trupulleikum, er neyðugt, at myndugleikarnir skunda undir marknaðarbúskapin. Men tað krevur, at teir ráðandi politikararnir sleppa gomlum vanum so sum eftirlitinum við, hvat fólk havast at. Men fyribils hevur stjórnin ikki givið teimum ungu nakra vón í so máta.

Um Laos:

Alment navn: Laos - fólksins demokratiska lýðveldi

Landafrøði: Laos er 236.800 ferkilometrar. Grannalondini eru Vietnam, Kambodja, Thailand, Burma og Kina.

Fólk: Tveir triðingar eru av fólkaslagnum Lao Loum, sum yvirhøvur búgva í láglendinum og við Mekong-ósan. 22 prosent eru av fólkaslagnum Lao Theung, sum búgva í hálendinum, og í fjøllunum búgva tey, sum eru av fólkaslagnum Lao Soung.

Stýrisskipan: Kommunistisk einflokkaskipan við forseta og stjórn.

Átrúnaður: 60 prosent eru buddhistar, og umleið 35 prosent hava ymsan armimistiskan átrúnað. Ein lítil minniluti eru kristin.

Búskapur: Bruttotjóðarframleiðslan er 1300 amerikanskar dollarar fyri hvønn íbúgva.

Vinnuvegur: Umleið 80 prosent arbeiða innan landbúnað, skógarvinnu og fiskivinnu.

HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL

Ógloymandi borðhald og vínskeið við
VÍNSMAKKING
Cabernet Sauvignon og Chardonnay úr 5 heimspørtum
6. apríl 2001

Vit stíla fyri:
· vínsmakking við úrvaldum vínum,
· stórari várbuffet við meira enn 30 ymsum rættum
· dansi
· vistarhaldi
· flutningi

- framúr fyri kræsnar gómar og fólk í veitslulag -

Legg saman útferð, vínsmakking, várbuffet, gisting og dans og tú fært:

eitt ógloymandi kvøld
fyri 695,-
v/ gisting og flutningi úr Havnini

Vínfyritøkan AMKA vinimport kunnar um vín úr nýggja og gamla heiminum!

Dagsins vínkennari verður kosin, og fær virðisløn frá AMKA vinimport.

Twilight
undirhalda og spæla til dans

Vínsmakking, borðhald og dansur
325,-

Dansur
125,-

Vínsmakking er frá kl. 16.00 - 18.00
borðhaldið byrjar kl. 19.00 og
dansurin er frá kl. 23.00

Bíleggið í góðari tíð á tel 33 29 55
- avmarkað atgongd -

HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA
SØRVÁGUR
TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · T-Postur: hotel@ff.fo